
Mynd: Jens Kr. Vang

# Eitt gott og vælsvingandi Deja Vu

**Hóast tað steðgaði eitt sindur upp í miðjuni, so hevði Deja Vu eina tað bestu framførsluna á festivalinum**

SUMMARFESTIVALUR
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Fyrstir á Flagspallinum fríggjakvøldið vóru Deja Vu, ið spældu klokkan átta. Sum vanligt er við teimum fyrstu framførslunum á einum festivaldegi, so var eitt sindur tómligt við fólki at byrja við. Hetta gjørdist frægari sum framførslan leið.

Teir fimm í Deja Vu gjørdu nógv um seg fyri eini tíð síðani. Um tað mundið, tá ið fløgan hjá teimum 'A Place To Stand On' kom út, spældu teir dúgliga kring Føroyar. Men seinastu mánaðirnar hevur ikki verið nógv at hoyrt til teir, og av somu orsøk var tað við spenningi, at man bíðaði í Flagstjaldinum.

### Luftin úr ballónini

Deja Vu løgdu hart út og spældu nøkur av teirra meiri orkufyltu løgum. Við góðum botni frá bassi og trummum kundu hini ljóðførini og røddirnar leggja sítt sveimandi ískoyti omaná. Tað sat og svingaði væl. Sjálvur haldi eg, at hesi meiri peppaðu løgini rigga best.

Eftir tað komu nøkur friðarlig løg, sum tóku luftina úr ballónini. Serliga tað eina instrumentala lagið, ið koyrdi í fimm minuttir og stórt sæð í tveimum akkordum, var tungt at koma ígjøgnum. Møguliga hevði tað riggað í einum meiri inniligum umhvørvi. Inni í einum lítlum, sýrutum konserthøli við stearinljósum og pútum á gólvinum a la Losjan í Gøtu. Men í Flagstjaldinum, á alljósum degi, tók tað ikki við.

### Gloymd genta

Við sær á palli høvdu Deja Vu fingið Ásu Wraae Olsen, ið eisini var við á G! Festivalinum. Hon hevur eina Eivör-líknandi rødd, ið riggar væl inn í droymandi tónleikin hjá Deja Vu. Men gjøgnum stóran part av framførsluni hoyrdist hon næstan ikki. Serliga í tí eina lagnum, har hon sang einsamøll, var tað súrt, at hon ikki hoyrdist betri.

Men burtursæð frá hesum, so skulu ljóðmennirnir fáa eitt herðaklapp fyri at fáa so frætt ljóð inni í tjaldinum.

### Egið sound

At enda kom frálíka lagið 'Is There Someone', og tá ið Deja Vu vórðu klappaðir uppaftur, kom 'Confused', ið er eitt av bestu føroysku løgunum nakrantíð eftir mínum tykki.

Deja Vu spæla sín egna tónleik og leggja seg eisini eftir at hava sítt egna sound. Eitt altjóða sound, og tað er altíð gott.

Tað riggar væl, og teir høvdu eina sera góða konsert fríggjakvøldið, hóast tað steðgaði eitt sindur upp í miðjuni. Mín besta tónleikaupplivingin á vindbarda festivalinum.

# Sorgblíður Stanley


*Stanley og bólkur hansara dugdu hildu seg til tað minimalistiska*
Mynd: Jens Kr. Vang

**Romantiskar yrkingar og vakurt gittarspæl myndaðu konsertina hjá Stanley Samuelsen**

SUMMARFESTIVALUR
*Oddur á Lakjuni*
*planet@sosialurin.fo*

Stanley er ein rutineraður maður. Hann spælir sum ein dreymur uppá gittaran. Afturat sær hevði hann tveir tónleikarar, og saman spældu teir sera væl. Tónleikararnir dugdu sera væl at halda seg aftur, og at spæla minimalistiskt.

Hann spældi bæði sangir av fyrru og seinnu fløguni hjá sær. Tað vóru vakrar yrkingar, har fleiri vóru fosturlandssangir. Fleiri av sangunum vóru kendar føroyskar yrkingar, sum hann sjálvur hevur gjørt lag til.

Sum heild vóru sangirnir nokkso sorgblíðir og romantiskir.

Tað var friðarligur og dempaður tónleikur, sum, av tí at tað var so róligt, saktans kundi verið koyrt harðari frá. Onkrir sangir fóru yvir í latínskar rútmur. Hann spældi eina flotta útseting av "Regn og regn og regn" hjá Mikkjali á Ryggi, og Stanley fekk tað at ljóða, sum um sangurin gott kundi havt verið skrivaður í Meksiko. Her slapp hann við fingraspælinum veruliga at vísa, hvussu góður gittarspælari hann er.

Tað vóru rættiliga nógv fólk til staðar, men av tí at tónleikurin var friðarligur og ikki serliga hart frá, stóðu nógv og prátaðu, heldur enn at lurta. Tó til kendasta sangin, "Um eg kundi kvøðið", bæði lurtaðu tey og sungu við.

# Fólkið vildi ikki sleppa Hanusi

**Hóast regnið gjørdi eina roynd, so megnaði tað ikki at spilla góða hýrin á fólkunum, ið lurtaðu eftir Hanusi**

SUMMARFESTIVALUR
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*


*Hanus var einsamallur á stóra pallinum*
Mynd: Jens Kr. Vang

Hanus G. Johansen trein á metstóra pallin á Vágsbøði eitt sindur seinkaður vegna longu spælitíðina hjá Scorpions.

Hann tyktist eitt sindur einsamallur á stóra pallinum aftaná eina konsert, sum nærum blásti alt og øll umkoll. Men hóast hetta megnaði Hanus, sum so mangan áður, at fylla tómrúmið við síni nærveru og einføldu framførslu, hann og gittarin tveireinir.

Talan var ikki um nakra nýhugsandi ella slóðbrótandi framførslu, men tað var heldur ikki tað, ið fólkið ynskti at hoyra. Hanus er fólkaogn, og tá ið hann sang kendar sangir sum 'Átjan', 'Saknur' og 'Á, kundi á tíðarhavi', vóru tað fá, ið ikki sungu ella murraðu við.

Regnið, ið hevði hildið seg burtur meðan Scorpions spældu og tað mesta av kvøldinum, kom á vitjan mitt í framførsluni. Men hetta darvaði hvørki Hanusi ella áhoyrarafjøldini, ið var hampiliga stór.

Tá ið tíð var at gevast, vildi fólkið ikki sleppa Hanusi við tí úrsliti, at hann sang trý eykaløg.